Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Sálarlig skaðastova

Spurningar:

1. Hvussu gongur við fyrireikingunum av sálarligu skaðastovuni?
2. Nær kann væntast, at sálarliga skaðastovan letur upp?

Viðmerkingar:
Í eina tíð hevur verið arbeitt við at lata eina sálarliga skaðastovu upp á skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum, so at vit kunnu veita bráðfeingishjálp til teirra, ið tørva tað. At kunna veita sálarliga bráðfeingishjálp er ein liður í at javnseta sálarliga heilsu og kropsliga heilsu. Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, hvussu tað gongur við arbeiðinum við sálarligu skaðastovuni.

Á Løgtingi, 10. mai 2023

Hervør Pálsdóttir